# FSF kann ikki sleppa Tórsvølli



*Hóðast áskoðaratalið ikki var av teim hægstu á Svangaskarði, so hoyrdist rómurin til tíðir væl*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**VØLLURIN Hóast Brian Kerr og føroyska landsliðið hava fingið fýra stig av seks møguligum á Svangaskarði seinasta árið, so verður landsdysturin móti Italia spældur á Tórsvølli. Fótbóltssambandið skal hinvegin taka støðu til, hvar dystirnir móti Estlandi og Slovenia skulu avgreiðast**

Uni Holm Johannesen

Kjakið, um føroyska fótbóltslandsliðið skal spæla sínar landsdystir á Svangaskarði ella Tórsvølli, hevur aftur fingið luft undir veingirnar.

Úrtøkan hjá Brian Kerr, landsliðsvenjara, og føroyska landsliðnum er fýra stig á vøllinum á Toftum fyri dystirnir móti Litava og Norðurírlandi.

Brian Kerr hevur staðfest, at hann ynskir at spæla dystirnar á Svangaskarði. Hann hevur grundgivið fyri, at endamálið við heimadystum skal fremst av øllum vera, at mótstøðuliðini fáa eina so trupla uppgávu sum tilber í Føroyum. Vøllurin á Svangaskarði er minni enn Tórsvøllur, sum ger, at tað er minni pláss at spæla á. Áskoðararnir sita eisini nærri vøllinum, og tí er rómurin betur kring vøllin enn í Havn.

Virgar Hvidbro er aðaðskrivari í Fótbóltssambandið. Hann staðfestir aftaná dystin í gjár, at úrslitini tala fyri, at landsliðið skal spæla á Svangaskarði.

– Fýra stig av seks møguligum er nógv hjá føroyska landsliðnum. Men tað eru ikki bara úrslitini sum avgerða, um vit spæla á Svangaskarði ella Tórsvølli, sigur Virgar Hvidbro.

## Italia verður á Tórsvølli

Italia skal spæla í Føroyum tann 2. september í 2011. Tað er longu greitt, at dysturin verður spældur á Tórsvølli.

Framleiðslumøguleikarnir hjá italskum fjølmiðlum eru ikki nøktandi á Svangaskarði, og tað er fyrst og fremst orsøkin, at dysturin verður spældur í føroyska høvuðsstaðnum.

Fótbóltslandsliðið hjá Estlandi og Slovenia vitja eisini í Føroyum í 2011, og Fótbóltssambandið hevur framvegis ikki gjørt av, hvar teir dystirnir verða spældir.

Tað sigur Virgar Hvidbro, aðalskrivaði.

– Men Brian Kerr hevur fleiri ferðir sagt, at hann vil helst spæla á Svangaskarði. Hansara avgerðir hava sjálvsagt týdning, tá avgerðin verður tikin. Politiski myndugleikin ynskir, at báðir vøllirnir verða nýttir, sigur Virgar Hvidbro.

Men úrslitini benda greitt og týðiligt á, at landsliðið skal spæla á Toftum – er tað ikki rætta loysnin?

– Úrslitini hava verið betri á Svangaskarði, men sum sagt, tað er annað, sum eisini hevur týdning, sigur Virgar Hvidbro.

## Leikararnir siga lítitð

Christian Lamhauge Holst skeyt føroyska málið í gjár.

Hann vil ikki beinleiðis siga, um tað loysir seg best at spæla á Svangaskarði.

– Søgan sigur okkum, at føroyska landsliðið fær flestu stigini á Toftum. Tað er eisini ein fyrimunur, at áskoðararnir sita nær við vøllin, tí geylini og trummurnar eru við at lyfta liðið. Men nú má eg ansa eftir, hvat eg sigi, tí føroyska familjan býr í Havn, sigur Christian Lamhauge Holst.

Brian Kerr tímdi illa at tveita seg í kjakið um Svangaskarð og Tórsvøll, aftaná dystin í morgin.

– Nú skulu vit bara fegnast um javnleikin. Men úrslitini tala mína søk, sigur hann.

Atli Gregersen, sum spældi í miðverjuni, greiddi eisini frá fyrimunum við vøllinum á Toftum.

– Vøllurin er minni, og hini liðini hava minni pláss at spæla á. Tað er ein fyrimunur hjá okkum, sigur hann.

uni@sosialurin.fo

# Brúkið báðar vøllirnar

**VØLLURIN Helgi L. Petersen, fótbóltsviðmerkjari, sigur, at landsliðið skal framvegis spæla sínar dystir á Tórsvølli og á Svangaskarði.**



*Helgi L. Petersen, fótbóltsviðmerkjari*

*savnsmynd*

***Hví tað?***

– Tað eru fyrimunir við báðum vøllunum. Tað sigur seg sjálvt, at landsliðið skal eisini spæla í høvuðsstaðnum. Søguliga hava úrslitini verið betri á Svangaskarði, men tað er eingin orsøk at kolldøma Tórsvøll. Umstøðurnar hjá fjølmiðlunum, áskoðarunum og leikarunum eru betri í Havn.

***Úrslitini vísa, at landsliðið skal spæla á Toftum. Skal tað ikki raðfestast hægst?***

– Jú, men eg vil seta spurnartekin við mótstøðuliðini, sum hava spælt á Svangaskarði. Eg havi ikki sæð Thierry Henry ella Francesco Totti á Toftum. Leisturin hevur verið, at stóru stjørnurnar spæla í Havn, og smærri tjóðirnar spæla á Toftum. Møguleikin at fáa stig hevur altíð verið størri á Svangaskarði. Landsliðið spældi javnt móti Eysturríki, sum eru á nøkunlunda sama støði sum Norðurírland og Litava. Tann dysturin var á Tórsvølli.

***Umstøðurnar at spæla fótbólt hjá føroyska liðnum eru betri á Toftum, tí vøllurin er so lítil. Er tað ikki júst tí, at Svangaskarður skal brúkast?***

– Vøllurin er minni á Svangaskarði, og tað er ein fyrimunur. Men hinvegin, so vil føroyskur fótbóltur menna seg, at tað er sagt, at føroyingar skulu spæla meira bólt og bjóða mótstøðuliðinum av leikliga. Tað eru møguleikarnir ikki reiðiliga til á Svangaskarði, júst tí, at vøllurin er so lítil, sigur Helgi L. Petersen.